# Sethús á Argjum









Sethúsini eru í trimum hæddum. Í ovaru hæddini er gongd, vesi við brús, køkur, stova, tvey kømur, baðirúm og hjallur. Frá stovuni er útgongd til eina stóra terassu við góðum sólargangi. Inn frá hjúnarúminun er klárt at gera baðirúm. Í niðaru hæddini er fýrrúm, 3 kjallarrúm og bilhús. Húsini hava eitt stórt og gott loft har góður møguleiki er fyri at innrætta fleiri rúm. Undir terassuni er eitt stórt goymslurúm. Húsini standa í barnavinarligum, veðurgóðum og friðarligum umhvørvi á Argjum. Stutt er til miðbýin, dagstovnar og skúla. Húsini hava sera gott útsýnið yvir Havnina og út á Nólsoyar fjørð.

**Fakta:**

Adressa .......... Suðurstíggjur 11, argir
Byggiár:........... 1987
Hæddir:........... 3
Stødd innan: ... 254 $m^2$
Grundøkið: ..... 540 $m^2$
Prísuppskot: ...

# Sethús í vesturbýnum í Havn









Sethúsini eru í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er durur, gongd, baðirúm við baðikar, køkur, stova, tvey kømur og eitt hjúnakamar við einari stórari altan. Eitt ovasta loft er, ið verður brúkt sum goymslurúm. Ein stór og veðurgóð terrassa er frammanfyri køkin og við endan av terrassuni er ein hjallur. Undir terrassuni eru tvey rúm – arbeiðs-/goymslurúm. Trappugongd er frá ovaru hæddini til eitt stórt alrúm í niðaru hæddina. Í niðaru hæddini eru tvey kømur – harav ta eina kamari er sera stórt, rúmlig gongd, brúsirúm, vaskikjallari við inngongd til ein góðan hjall. Útsýnið er gott og ein garður er gjørdur runt um húsini. Húsini standa væl fyri í vesturbýnum. Tað eru bert fáir minuttir til gongu til vøggustovu ogbarnagarð og til handils. Eisini er gott bussamband.

**Fakta:**

Adressa .......... Velbastaðv. 46, Tórshavn
Byggiár:........... 1968
Hæddir:........... 2
Stødd innan: ... 210 $m^2$
Grundøkið: ..... 542 $m^2$
Prísuppskot: ... 2.300.000

skyn

Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo